## Várkonsert

Sunnudagin 13. mai kl 16 fer Vágakórið at hava sína árligu várkonsert í auluni í Miðvágs-Sandavágs skúla.

Kórleiðari er Katrina Petersen, sum er útbúgvin sangari/sangpedagogur. Umframt at leiða Vágakórið og Ungdómskórið í Vágum, undirvísir hon í sangi í Musikkskúlanum í Vágum og í Havn.

Á skránni eru mest vársangir og lættir og skemtiligir sangir úr Føroyum og hinum norðurlondunum umframt sangir av bretskum uppruna.

Í kórinum eru 24 sangarar, og framførslan verður skipað sum blandað kór og manskór og kvinnukór.

## Kommunan bíðar

Í gjár vistu vit at siga, at Yvirfriðingarnevndin hevur givið Landsverki loyvi at fara undir at gera veg oman fyri sjóvarmálan í Leirvík, og at stovnurin fyrireikar seg til at bjóða arbeiðið út. Nú ger Leirvíkar kommuna vart við, at eitt samt bygdarráð kærdi ætlanina hjá Landsverki fyri vinnumálaráðnum, men at kommunan ikki hevur fingið svar enn. Tí væntar kommunan ikki, at vegarbeiðið kann byrja, fyrr enn kæran er svarað.

# Føroyar mugu fyribyrgja vandamikla sjúku

**Fleiri enn ein av hvørjum 25 føroyingum eru berarar av einari sera álvarsamari sjúku, sum verður kallað 'Føroyska sjúkan'. Barnalæknin, sum fann fram til sjúkuna, Ulrike Steuerwald, sigur, at føroyingar mugu taka støðu til hvussu sjúkan skal fyribyrgjast í framtíðini**

FØROYSKA SJÚKAN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Barnalæknin, Ulrike Steuerwald, hevur í mong ár arbeitt við børnum við tí sokallaðu 'Føroysku sjúkuni', og hon hevur funnið fram til, at síðan 1977 eru í minsta lagi 16 føroysk børn fødd við hesi sjúkuni.

- Børnini hava veikar vøddar, eru tunghoyrd og hava ilt við at stýra sínum rørslum. Mentalt eru tey ikki øðrvísi enn onnur.

Miðal livialdurin fyri hesi børn eru 9-10 ár, men onkur hevur livað til tey vóru yvir 20. Sum nýfødd líkjast tey øðrum børnum, men, sum tey vaksa til, verða tey meir og meir óhjálpin.

Grannskingin vísir, at øll børnini hava akkurát sama enzym feil, nevndur SUCLA2 mangul. Nøkur fá børn aðrastaðni í heiminum hava ein líknandi feil, men júst henda sjúka finnst bert í Føroyum.

### Føroyingar sama forfaðir

Í samband við kanningarnar av sjúkuni vóru ættartalvurnar hjá øllum teim sjúku samlaðar, og tað vísti seg, at tey øll hava ein felags forfaðir, sum livdi á Oyri í 1600 talinum.



*Ró Joensen verður skjótt 4 ára gomul. Hon hevur 'Føroysku sjúkuna', sum ger at hon kroppsliga er sera óhjálpin. Men hon er skilagóð og dugir væl at smílast*

Talan er um eina víðkjandi sjúku, tað vil siga at bæði foreldrini skulu vera í familju við Oyramannin. Men av tí at Føroyar er so lítið land við so lítlari tilflyting er títtleikin av berarum í dag fleiri enn ein av hvørjum 25 føroyingum.

Ulrike Steuerwald heldur tí tað hava alstóran týdning, at føroyingar tosa um og taka støðu til, hvussu henda sjúkan skal fyribyrgjast.

Ein háttur, sum hon heldur vera skilagóðan er, at øll børn vera screenaði fyri um tey eru berarar. Svarið verður so arkiverað anonymt við nummarið.

- Vandin fyri sjúkuni má upplýsast fyri ungum í t.d. lívfrøðitímunum, sigur týski barnalæknin. Og tá eitt par so finnur saman kunnu tey ringja inn og vita um teirra nummar passa saman, ella um tey bæði eru berarar.

### Fyribyrging og vitan

Í dag ber til hjá einum parið, har bæði eru berarar, at fyribyrgja, at komandi børn teirra hava 'Føroysku sjúkuna'. Ulrike Steuerwald greiðir frá, at við gendiagnostikki, ber til at kanna um gitnu kyknurnar hava viðkomandi feilin, áðrenn tær verða settar upp í móðurlív.

Margreth Josephsen, sum er mamma at knappt 4 ára gomlu Ró, sum hevur 'Føroysku sjúkuna,' sigur at, hon gleðist um at eldra dóttir hennara kann fáa at vita, um hon er berari, áðrenn hon fær sær børn. Og sjálvt um lítla Ró er ein sólstrála í teirra lívi, so heldur Margareth eisini, at meir vitan er góð og neyðug.

- Vit hava stutt síðani fingið at vita at fyrsta dóttir okkara doyði av somu sjúku, og tað kennist gott at vita hetta. Og í dagliga lívið okkara við Ró er tað eisini gott at vita, at hon skilur alt, men at tað ikki nyttar at venja hana kropsliga.

Ulrike Steuerwald leggur eisini dent á, at børn og foreldur mugu fáa neyðugu hjálp og vitan, samstundis sum vit sum samfelag mugu taka støðu til, hvussu sjúkan kann fyribyrgjast í framtíðini.

Gongur væl í fíggjarverðini:

# Eik risaavlop fyrsta ársfjórðing

**Eik Banki hevur eitt avlop eftir skatt fyri fyrsta ársfjórðing upp á heili 120,5 milliónir**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað gongur strúkandi í føroysku fíggjarverðini. Størsta føroyska bankasamtakið, Eik Banki, kann vísa á eitt stak gott úrslit fyri fyrsta ársfjórðing.

Botntølini vísa eftir skatt eitt avlop upp á 120,5 milliónir krónur. Hetta eru heilar 85 millionir fleiri enn fyri sama tíðarskeið í fjør.

–Fyrsti ársfjórðingur hevur hilnast sera væl. Vit hava stóran vøkstur í grundrakstrinum, bæði her heima og uttanlands, samstundis sum vinningsbýtið úr Spron var eitt avbera gott íkast til úrslitið, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

Eik eigur 10% av partabrøvunum í størsta íslendska sparikassanum, Spron, og er harvið eisini størsti partaeigari. Vinningsbýtið hjá Spron fyrsta ársfjóðring er heili 68 milliónir krónur, ella meiri enn helmingurn av samlaða avlopinum hjá Eik Banka samtakinum. Samstundis er virksemið í danska dóttirfelagnnum, Eik Bank Danmark, økt munandi.

Grundað á gongdina higartil í ár væntar Eik Banki, at samlaða ársúrslitið fyri 2007 fer at liggja um 340 milliónir krónur í avlopi áðrenn burturleggingar og skatt.

Eik Banki fyrireikar at børsskráseta seg í Virðisbrævamarknaði Føroya og á Københavns Børsfond innanfyri ein mánaða ella so, og tað er í tí sambandi, at Eik er farið at almannakunngera ársfjórðingsroknskapir.